# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Nýggir sjúkrarøktarfrøðingar



Mánadagin 18. januar tóku lesandi á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum prógv sum sjúkrarøktarfrøðingar.
**Fremra rað f.v.:** Elin Maria Jóannesardóttir av Reyni, Tórshavn, Elsebeth Sofía Danielsen, Árnarfjørður, Ketty Danielsen, Klaksvík, Fríðhild Kristina Højgaard, Saltnes, Jenny Hansen, Syðrugøta, Heidi Joensen, Tórshavn, Vanja Johansen, Saltangará, Mirjam Doreta á Lakjuni, Leirvík, Valborg H. Laksáfoss, Hoyvík,
**Aftara rað f.v.:** Margith Olsen Latupeirissa, Klaksvík, Rakul Olsen, Tórshavn, Joan Poulsen, Funningur, Judith Schwartson, Tórshavn, Rini Sivertsen, Hoyvík, Gunnhild Thomsen, Hvalba, Tórvør Østerø Vang, Hoyvík, Lisbeth Vang, Argir og Christa Niclasen, Argir, (bachelor í sjúkrarøktarfrøði).

*åMynd: Jens Kristian Vang*

## Merkisdagar

**60 ára føðingardagur**
Leygardagin 23. jan. fyllir Tummas Lauritsen seksti. Dagurin verður hildin við hús á Tvørgarði 31 í Miðvági frá kl. 18. Vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
Sunnudagin 24. jan. verður Kjartan Stakksund, Eiði, 80 ár. Dagurin verður hildin við altargangsgudstænastu í Eiðis kirkju kl. 17. Síðani verður døguri í Ítróttarhøllini har øll eru hjartaliga vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
1. feb. verður Hans Poulsen, Hans av Eiði, 80 ár. Dagurin verður hildin 6. feb. hjá dótturini í Kristiansgøtu 37, Hoyvík, frá kl. 17.

**Diamantbrúdleyp**
28. jan. kunnu hjúnini Diana og Alfred Klein, Fuglafirði, halda diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík leygardagin 30. jan., kl. 16, har øll eru vælkomin. Fólk verða biðin um at siga frá í seinasta lagi 23. jan. á tlf. 444092.

**Diamantbrúdleyp**
Fríggjadagin 26. feb. hava hjúnini Heinina og Sigurd Gaard Hansen diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin tann 27. feb. kl. 17 í Royndarhúsinum í Nólsoy. Tey, sum vilja gleðast saman við okkum, verða biðin um at siga frá á tlf. 327145 ella 527145 innan 7. feb.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 2. feb. hava Jóhan Petur S. og Lis Olsen silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í kafeteria í Kelduni í Skálafirði týskvøldið 2. feb. frá kl.18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Prógv**
Tann 20. jan. 2009 var Jóanes Reinert, Tórshavn, útlærdur sum hotelkokkur. Læruplássið var Restaurant Salt á Admiral Hotel í København.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Anna Samuelsen í Kollafirði** andaðist týsdagin á Eldrasambýlinum í Kollafirði, 97 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Zion í Kollafirði fríggjadagin kl. 13.

Kistan við **Ivu Salomu Hansen, Norðskála**, fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum hósdagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Norðskála kirkju fríggjadagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Ivu, kunnu lata Norðskála kirkju eina peningagávu, konta í Eik.

**Hjalti Joensen, Hvannasund**, andaðist mánadagin, 74 ára gamal.

**Johannes Dahl Hovgaard, vanliga nevndur Johannes hjá Hassa**, ættaður úr Vági, búsitandi í Haderslev, andaðist hósdagin, 62 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Åstrup Kirke, Åstrup Allé 21 í Haderslev fríggjadagin kl. 11.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá ið kæra kona, mamma, omma og langomma okkara

**Petrina (Dinna) Ziskasen**
Klaksvík

fór heim til Harran og varð jarðað.

Tøkk til Norðoya Røktarheim fyri alla umsorgan og hjálp, tit sýndu henni øll árini, tit vóru um hana. Tøkk til talarar, berarar, spælarar, tykkum, sum hjálptu til við ervinum, og øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað her á fold.
Og tøkk, øll tit, ið mintust hana við at senda peningagávur til Zarepta.

*Vegna familjuna*
**Mikkjal**
**Jórun, Lis og Jan**

## Dagurin

**21. januar. Agnes**, deyð umleið ár 300. Halgisøgan um Sanktu Agnes er ein av teimum elstu frásøgnunum um blóðvitni í fornkirkjuni. Hon vildi giftast heidnum fríggjara og varð tikin av døgum. Grikst navn ið merkir: hin óspilta.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*